# Hvørgin parturin vil slaka

*Føroya Lærarafelag stendur fast við síni krøv, meðan Fíggjarmálastýrið ikki til hoyra talan um so nógvar meirútreiðslur. Drúgt verkfall er fyri framman*

EYÐUN KLAKSTEIN

Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið eru langt frá eini loysn á sáttmálastríðnum, og verkfallið, sum nú rakar fólkaskúlan, kann gerast drúgt.

Tá fólk fóru hvør til sítt á midnátt týskvøldið, høvdu báðir partar vrakað semingsuppskotið, sum semingsmenninir, Rúni Heinesen og Allan Skaalum, høvdu lagt fyri teir.

Og hvørgin parturin er sinnaður at slaka, nú fólkaskúlalærararnir fyri fyrstu ferð eru farnir í lógligan arbeiðssteðg.

– Vit hava bakkað nóg leingi. Nú fara vit at standa fast við okkara krøv, sigur Elsa Birgitta Petersen, sum er formaður í Føroya Lærarafelag.

Í tíðindaskrivi, sum Fíggjarmálastýrið hevur sent pressuni, staðfestir almenni arbeiðsgevarin, at hann er ikki sinnaður at lata Lærarafelagnum meira pengar, enn onnur feløg á almenna arbeiðsmarknaðinum hava fingið.

### Ymiskar fortreytir fyri samráðingunum

Fíggjarmálastýrið samantvinnar lønarkrøvini hjá Lærarafelagnum og krøvini um betri arbeiðstreytir til lærararnar. Og hesi samlaðu krøvini vóru millum 10 og 11 prosent í semingsuppskotinum týskvøldið. Tað vildu Karsten Hansen og hansara fólk ikki ganga við til.

Hinvegin helt Føroyar Lærarafelag, at hetta var ikki nóg mikið.

Lærarafelagið leggur upp til, at lærararnir fáa somu lønarhækking, sum onnur á almenna arbeiðsmarknaðinum hava fingið. Men harafturat krevur felagið betri arbeiðsumstøður, so lærararnir kunnu liva upp til nýggju fólkaskúlalógina. Hesar treytir botna í, at fleiri lærarar skulu setast í starv – helst eini 50 nýggir lærarar.

Tað hevði kostar tí almenna nógv milliónir, og hóast Lærarafelagið er sinnað at tosa um eina tillagingartíð, vil Fíggjarmálastýrið ikki lata fleiri pengar til lærararnar, enn onnur á almenna arbeiðsmarknaðinum hava fingið.

– Fíggjarmálastýrið hevur gjørt 31 sáttmálar, sum allir hava kostað nøkunlunda tað sama, og tí kundu vit ikki lata ein einstakan bólk fáa næstan dupult so nógv, sum onnur hava fingið, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Fíggjarmálastýrinum.

Landsstýrismaðurin sigur seg vera bilsnan av, at semingsuppskotið liggur so langt frá øðrum sáttmálum, sum eru gjørdir á almenna arbeiðsmarknaðinum seinastu tíðina.

### Ósamd um arbeiðstíð

Fíggjarmálastýrið sigur í tíðindaskrivi sínum, at um tað hevði gingið við til semingsuppskotið hevði undirvísingartíðin hjá lærarunum í Føroyum verið lægri enn hon er í Danmark, Noregi og Svøríki.

– Hetta er púra við síðuna av, sigur formaðurin í Lærarafelagnum, sum hinvegin vil vera við, at undirvísingartíðin í Føroyum er tann hægsta í norðurlondum.

– Tað eru lagdar so nógvar nýggjar arbeiðsuppgávur á lærararnar í nýggju fólkaskúlalógini, at teir klára ikki at loysa hesar uppgávur við verandi arbeiðsumstøðum. Teir mugu fáa betri stundir til at gera arbeiði, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Men Karsten Hansen vil ikki seta undirvísingartíðina munandi niður, tí tað fer at kosta tí almenna ov nógvar pengar.

Ein triðingur av lærarunum í Fólkaskúlum eru farnir úr skúlanum, og Lærarafelagið brynjar seg nú til eitt langt verkfall, har tey eisini fara at seta onnur tiltøk í verk. Hvørji hesi eru, er ikki greitt, men talan kann verða um blokadu av til dømis skeiðum, nevndararbeiði og starvssetanum.

# Børnini sleppa at strúka

*Læraraverkfallið hevur við sær ósamanhangandi skúlagongd. Tað er óforsvarligt at sleppa teimum yngstu børnunum upp á fjall, halda skúlastjórar*



*Yngstu skúlabørnini verða slept upp á fjall, og koma foreldrini ikki eftir teimum, tá tey hava frítímar, er eingin at ansa teimum. Hetta er ein óforsvarlig støða, halda skúlastjórar. Mynd: Jens Kr. Vang*

EYÐUN KLAKSTEIN

Verkfallið hjá einum triðingi av fólkaskúlalærarunum skapar ruðuleika í føroysku skúlunum.

Kring alt landið er undirvísingin rakt av verkfallinum, og í flestu førðum skulu næmingar í skúla partar av tíðini, teir vanliga eru í skúla.

Teir lærarar, sum ikki eru verkfalli, undirvísa sum vanligt, meðan næmingarnar fáa frí, tá tey eiga at hava ein av teimum sáttmálasettu lærarunum.

Hetta hevur við sær ósamanhangandi undirvísing hjá teimum flestu næmingunum, og tað er serliga ein vansi hjá teimum yngstu skúlabørnunum, sum skulu ansa sær sjálvum, tá eingin lærari er at taka sær av teimum.

### Óforsvarligt

– Tað er er óforsvarligt at sleppa teimum yngstu børnunum upp á fjall, men vit fáa einki gjørt við tað. Vit hava givið foreldrunum nýggja tímatalvu, so tey vita, nær børnini fáa undirvísing og ikki, sigur Hanus Joensen, sum er skúlastjóri í Kommunuskúlanum í Havn.

– Tað eru ikki øll foreldrini, sum koma eftir teimum børnunum, tá tey hava frítímar. Vit liggja mitt í býnum, og tí kann tað vera vandi á ferð, tá eingin er at ansa teimum yngstu børnunum.

### Partur av verkfallinum

Aðrir skúlastjórar, sum Sosialurin hevur tosað við, stúra eisini fyri støðuni, nú 7 og 8 ára gomul børn sleppa at strúka, uttan at nakar er at ansa teimum.

Formaðurin í Føroya Lærarafelag harmast um støðuna, men hon heldur, at hendan støðan er partur av verkfallinum.

– Vit hava roynt at gjørt eina semju við Fíggjarmálastýrið, men tað eydnaðist ikki, og tí verða vit noydd at seta arbeiðssteðgin í gildi, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Endamálið við einum verkfalli er at gera støðuna so trupla, at tað skundar undir eina loysn, og í hesum førði eru tað børn og foreldur, sum eru líða undir, at Fíggjarmálastýrið og Lærarafelagið ikki kunnu semjast.

### Ymiskt hvussu tað rakar

Umleið ein triðingur av lærarunum eru farnir í verkfall. Tað er ymiskt, hvussu hetta rakar skúlar og flokkar, men allastaðni er talan um stórt órógv.

Hoyvíkar skúli er ein av teimum harðast raktu, tí har eru 14 av 24 lærarum farnir í verkfall. Í Kommunuskúlanum í Havn er akkurát triði hvør av 40 lærarum farnir í verkfall.

Runavíkar kommunuskúli er ikki so hart raktur, tí har eru 9 av 38 lærarum í verkfalli, og í Runavík halda tey ikki, at hetta órógvar so nógv, sum tað kundi gjørt.

Í skúlanum við Ósánna í Klaksvík eru 11 av 30 lærarum í verkfalli.

Líkt er til, at verkfallið verður drúgt, og allir skúlastjórarnir, sum vit hava tosa við, siga, at tað heilt einfalt ikki ber til at liva við einum drúgvum verkfalli í fólkaskúlanum.



# Blása á siðvenjuna

*Nýggju almennu stjórarnir blása á alt, sum hevur verið siðvenja í fyristitingini. Teir gera, sum teimum líkar best, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag*

EDVARD JOENSEN

Lønardeildin í Fíggjarmálastýrinum noktar blankt at gjalda eftirløn til tvær vaskikonur hjá Toll- og Skattstovuni í Vágum. Tað hevur annars verið siðvenja, at tað almenna hevur fylgt sáttmálunum á privata arbeiðsmarknaðinum, tá talan er um fólk, sum arbeiða hjá tí almenna. Tað hevur verið galdandi fyri bæði landsstovnar og kommunur.

Málið snýr seg um, at Lønardeildin ikki vil gjalda tvey prosent eftirlønargjaldið til tvær vaskikonur, sum arbeiða tímaløntar hjá Toll- og Skattstovuni í Vágum. Hóast hetta verður gjørt á øðrum økjum hjá sama stovni, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Eftirlønarskipanin byrjaði í 1997, og tá var okkurt smávegis gníggjarí í Vága Øki. Síðan hendi tað, at tey fólkini, sum tá vaskaðu á stovninum góvust. Tá so nýtt fólk kom, var semja um, sigur Ingeborg Vinther, at hetta skuldi avgreiðast eftir verandi siðvenju.

Toll- og Skattstovan lovaði tá bæði bót og bata, og eingin ivi skuldi vera um, at her skuldi gjaldast bæði til eftirløn og lívstrygging, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Men nú eru komin harraboð úr Fíggjarmálastýrinum, har sagt verður, at einki verður goldið, tí Føroya Arbeiðarafelag hevur ongan sáttmála um størvini.

Men líka mikið, um nakar undirskrivaður sáttmáli er ella ikki, er talan her um sáttálabrot, sigur Ingeborg Vinther. Tí tað almenna hevur við at halda eina siðvenju í hevd í trífjórðingsøld bundið seg til sáttmálan hjá Føroya Arbeiðarafelag.

### Nýggjur trupulleiki

Bæði landið og kommunurnar hava bundið seg til at halda galdandi sáttmálar á privata arbeiðsmarknaðinum, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag. Og tað hevur altíð verið hildið, líka til nú, sigur hon.

Ingeborg Vinther sigur, at nú nýggir leiðarar eru komnir á almennar stovnar, er ein nýggj tíð eisini byrjað í fyrisitingini. Tað verður blást á alt, sum hevur verið siðvenja, síðan Føroya Arbeiðarafelag varð stovnað fyri skjótt 75 árum síðan, sigur formaðurin.

Hon vísir á, at tað er altíð lættast at fara eftir teimum, sum minst formáa sær. Soleiðis er eisini hesaferð.

Nú eru tað tvær vaskikonur, sum skulu knúlvast, tí leiðarin á Lønardeildini sigur, at eingin sáttmáli er, hóast sáttmálin hevur verið praktiseraður í meira enn ein mansaldur.

»Hetta er heilt nýtt í okkara verð«, sigur Ingeborg Vinther. »Men teir sleppa ikki so, tí teir hava við siðvenjuni góðtikið, at sáttmálin skal haldast, og tí fara vit at stríðast fyri.«

Ingeborg Vinther sigur, at tað hevur ongantíð verið nakar trupulleiki við almennu stovnunum, uttan Toll- og Skattstovuni. Hon nevnir stovnar sum Landsverkfrøðingin, Føroya Tele, SEV og Strandferðsluna. Har hava ongantíð verið nakrir trupulleikar við at halda eina avtalu, sigur hon.

Hví hesin trupulleikin nú skal vera á Toll- og Skattstovuni, dugir Ingeborg Vinther ikki at skilja. Har hevur borið til at arbeitt eftir sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag fyrr, vísir hon á.

Men nú eru nýggir tónar komnir á Fíggjarmálastýrinum, sigur Ingeborg Vinther.

### Munur er á

Ingeborg Vinther sigur, at í Føroya Arbeiðarafelag standa tey púra býtt. Tí samstundis sum Fíggjarmálastýrið noktar at gjalda tvey prosent í eftirløn til tvær vaskikonur, sum fáa eina tímaløn upp á kr. 80,17, leggur løgmaður uppskot fyri Løgtingið um at hækka sína egnu og landsstýrismannaeftirlønirnar við 60-70 prosentum.

Ingeborg Vinther heldur tað vera løgið, at ein landsstýrismaður skal vera so nógv meira verdur enn vaskikonan.

Landsstýrismaðurin skal hava kr, 26.000 um mánan, sum er fleiri ferðir ta fullu lønina hjá vaskikonuni.

»Eg haldi, at skommin nú er fullkomin«, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Har er einki eftir, sum eitur menniskjansligheit, heldur Ingeborg Vinther, sum sigur seg hava tosað við nógv fólk, sum beinleiðis skammast av teimum, sum ráða landinum.

Boðini um, at eingin eftirløn skuldi gjaldast vaskikonunum, komu frá Lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum.

Leiðarin á Lønardeildini, Tummas Magnussen, var ikki at hitta, tá roynt varð at fáa viðmerking frá honum. Og hóast annar maður hevur skrivað undir brævið, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið, fekst eingin at siga nakað um málið.



*Ingeborg Vinther sigur, at nýggju aðalstjórarnir í almennu umsitingini einki leggja í gamlar siðvenjur á arbeiðsmarknaðinum*

# Kommunali bygnaðurin hevur stóran týdning

*Hvat vilja vit við kommununum, spyr Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag*

Almennur pallborðsfundur hósdagin 9. mars kl. 20.00, í Glæmuni í Kvívík

Á heysti 1998 kom tann leingi væntaða frágreiðingin frá kommununevndini. Álitið var rúgvusmikið, men almenna orðaskiftið aftaná, stóð als ikki mát við tað umfatandi álitið. Tí síðani kommuniálitið varð almannakunngjørt hevur nærum onki verið at hoyrt um, hvørjar broytingar ið eru á veg í kommunalu skipanini í Føroyum. Tað kemst neyvan av ongum, tí líkt er til at politisk semja enn ikki er funnin um, hvussu kommunurnar skulu endurskipast og hvørji málsøki tær skulu umsita.

Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag heldur tað ikki vera nøktandi, at naggatódn er komið í hetta umráðandi málið. Kommunali bygnaðurin í einum landi hevur stóra ávirkan á dagliga lívið hjá borgarunum, og tí er tað ikki haldbært at politisku avgerðirnar í kommunumálinum støðugt vera útsettar. Neyðugt er tí at fáa innlit í, hvar teir politisku trupulleikarnir í málinum eru, og ábendingar um hvussu teir kunnu loysast, og tí hevur felagið tikið stig til henda fundin.

Men tað er eins umráðandi at vit føroyingar gera okkum greitt, hvat vit vilja við kommununum. Í staðin fyri bert at endurskipa tær tí tær eru ov smáar, mugu vit avgera hvørjar uppgávur tær endurskipaðu kommunurnar skulu røkja. Tí miðar fundurin eisini ímóti at greiða verður fingin á, hvørjar uppgávur ið skulu leggjst út til tær endurskipaðu kommunurnar. Og her er ein ørgrynna av ósvaraðum spurningum: Hvussu verður framtíðar uppbýtið millum land og kommunur? Merkir endurskipanin av kommununum, at almenn umsiting verður flutt úr miðstaðarøkinum til útjaðaran? Er vandi fyri vinar- og kenningapolitikki, um tær endurskipaðu kommunurnar fáa ov stórt vald? Á hvønn hátt skal eftirlitið við kommununum skipast? Hvønn týdning fáa kommunumørkini í framtíðini?

Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag væntar ikki at allir hesir spurningar vera svaraðir á einum fundi. Men kann skjøtil setast á nakrar av teimum, er endamálið við fundinum rokkið. Somuleiðis kann roknast við, at stórur áhugi er í at tjakast um tey nýggju kommunumørkini aftaná eina endurskipan, men ivasamt er um tíðin er búgvin til at gera nakra greiða niðurstøðu um henda spurningin.

Við pallborðið sita:
Anfinn Kallsberg, løgmaður Fólkaflokkurin
Høgni Hoydal, varaløgmaður Tjóðveldisflokkurin
Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður Javnaðarflokkurin
Leivur Hansen, býráðsformaður Tórshavn
Gunn Joensen, bygdaráðsformaður Vestmanna
Malan Johansen, tíðindafólk fyrrv. skrivari í Kommununevndini

Orðstýrari verður Øssur av Steinum, sigur Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag.


STÓR
ATLANTS-BUFFET
Á RESTAURANT HAFNIA
Fríggjadagin 10. mars & leygardagin 11. mars
frá kl. 18.00

Spennandi fiskarættir
t.d.:
• Dampaður hávur
• Royktur állur
• Leskilig laksa-roulada
• Royktur laksur
• Fiskaterrine
• Fiskalagkøka

• Stokt havtaska í bacon
• Reyðsprøka "florentine"
• Høgguslokkur "Espagnole"
• Dampað og roykt hýsa
• Stoktur hávur v/bláum Castello
• Rugmjøls-stoktur skøturavi
• Gratineraðar lippur
• Paneraðir kjálkar
• Ovnbakaður kalvi

• Stórt úrval av ostum
• Ráðhús-køka
• Rubinstein-køka
• Marcipan/frukt terta

Bert 155,-
Børn undir 12 ár - ½ prís

Eisini verður borðreitt við leskiligum kjøtrættum
Borð kann bíleggjast frammanundan.



Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33
HOTEL HAFNIA